Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Frelsunarherurin í Føroyum 80 ár:

# Umsorgan fyri øllum menniskjanum

*Njál Djurhuus, kunningarstjóri fyri Frelsunarherin í Noregi, Íslandi og Føroyum*



**Sunnudagin 24. oktober hátíðarhelt Frelsunarherurin sín 80 ára stovningardag í Føroyum. Hátíðarhaldið var merkt av góðum tónleiki, upplestri og talum**

HÁTÍÐARHALD

*Myndir: Álvur Haraldsen*

Seinasta vika var merkt av at Frelsunarherurin hátíðarhelt sín 80 ára stovningardag í Føroyum. Í vikuni var ein áhugaverd framsýning, sum í myndum og øðrum lutum lýsti farnu 80 árini, og í vikuskiftinum var so sjálvt hátíðarhaldið.

Á fundinum sunnukvøldið talaði Njál Djurhuus, sum er kunningarstjóri fyri Frelsunarherin í Noregi, Íslandi og Føroyum.

Jóannes Skaale las eina yrking eftir amerikanska rithøvundan N.V.Lindsay, sum Jóannes sjálvur hevur føroyska. Meðan hendan hugtakandi yrkingin varð lisin upp, varð lagið "Er tín sál tváa rein" framført í sangi og tónleiki.

Yrkingin var skrivað í sambandi við deyða William Booth og eitur "General William Booth enters Heaven"

Millum tey vitjandi var Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, sum eisini helt talu.

Streingjakór hjá Frelsunarherurin í Vági luttók eisini undir hátíðarhaldinum.

Frelsunarherurin varð stovnaður í London í 1865 av William Booth. Rørslan vaks skjótt og breiddi seg til onnur lond.

Í Føroyum varð Frelsunarherurin formliga settur á stovn í Havn tann 23. oktober 1924.

Í dag hevur Frelsunarherurin eina samkomu í Vági og eina í Havn.

Frelsunarherurin er kendur um allan heim fyri brúk av horntónleiki. Nøkur av heimsins bestu hornorkestrum hoyra til Frelsunarherin.

At prædika við orðum og hondum hevur altíð verið eyðkenni Frelsunarhersins. Umsorgan fyri øllum menniskjanum, samansett av anda, sál og likami, er eitt av slagorðum Frelsunarhersins.

Í Føroyum hevur Frelsunarherurin stovnað herberg fyri heimleys.

Soleiðis sum Frelsunarherurin er skipaður, við mongum sereyðkennum, m.a. búnar, tónleikur, útifundir og sosialt arbeiði, ger at hesin felagsskapur verður ein sjónlig mynd í samfelagnum.



*Sámal Jákup Joensen, leiðari hjá Frelsunarherinum*



*Jóannes Skaale las eina yrking eftir amerikanska rithøvundan N.V.Lindsay, sum Jóannes sjálvur hevur føroyska*



*Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður*





*Frelsunarherurin er kendur um allan heim fyri brúk av horntónleiki*



*Umleið 200 fólk vóru til hátíðarhaldið í samband við 80 stovningardagin hjá Frelsunarherinum í Føroyum*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Andrias Sjóvará, Tórshavn:

# 25 ára starvsdagur hjá Tórshavnar Sløkkiliði

**1. november 2004 hevur Andrias Sjóvará í Havn 25 ára starvsdag hjá Tórshavnar Sløkkiliði**



Andrias er 67 ára gamal og ættaður av Strondum, sonur Edvard og Annu Poulsen. Hann er elstur av fýra beiggjum, ið eru: Poul Benny, Vilhelm og John. Sum 14 ára gamal fór Andrias til skips við Knørri, og var hann nøkur ár til skips. Í 1955 fór hann í læru sum maskinsmiður hjá Wenzeli Petersen í Havn. Hann lærdi 1. ár í Havn, og fór síðani til Klaksvíkar at læra víðari hjá Hálvdani Olsen.

Í 1960 fór Andrias til Grønlands at rógva út saman við systkinabarninum Hensari Grástein. Teir fóru við Kallsevni til Borgshavn heilt har suðuri í Grønlandi. Tíðarskeiðið 1963-65 var Andrias í Føroyingahavnini. Andrias arbeiddi í smiðjuni hjá Nordafar. Arbeiðið var mest at umvæla og bøta um skipini, men um á stóð, royndu teir eisini at hjálpa til við flakamaskinunum eftir førimuni. Nógv var at gera í smiðjuni, har bæði týskarar, fransmenn, portugisar, norðmenn o.a. komu.

Arbeiðið í Grønlandi var tíðaravmarkað til summarhálvuna. Teir fóru yvir í mars og komu heimaftur í september/oktober, so vetrarhálvuna arbeiddi Andrias á skipasmiðjuni á Skála. Seinast í 1965 byrjaði Andrias á Tórshavnar Skipasmiðju, og har var hann heili 14 ár, til hann byrjaði á Brandstøðini 1. november 1979. Hesi 25 árini hava fýra brandmeistarar verið, fyrst Heini Veihe, so Erland Joensen, Petur Seloy, og nú Kartni Jacobsen.

Andrias hevur altíð havt stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum og fakfelagsarbeiði serstakliga. Sum tann álitismaður Andrias er, hevur hann sitið 11 ár í nevndini í Havnar Handverkarafelagi (1970-81), harav 3 ár sum skrivari og 8 ár sum formaður - 1973-81.

Í 1981 varð Andrias valdur í nevndina hjá Tórshavnar Kommunala Starvsmannafelag og seinni til formann. Andrias var formaður í 9 ár.

Andrias hevur eisini altíð havt stóran áhuga í kirkjuligum arbeiði. Í 2000 byrjaði hann sum klokkari við Havnar Kirkju, har hann eisini fæst við at syngja til guðtænastur og jarðarferðir.

Andrias hevur nógvar dygdir. Handverksliga setir hann eina æru í góðsku, og at ordan er í tingunum. Andrias hevur eitt stórt hjarta, og er hann altíð til reiðar at hjálpa bæði børnum, abbabørnum og øðrum. Sum pápi og abbi er Andrias ein sera góð fyrimynd og stuðul í tí dagliga.

Í 1966 giftist Andrias við Elisabeth F. Johannesen, ættað úr Húsavík, tey eiga 4 børn: Edvard, Kristiannu, Tórunn og Bjørg.

Í 1994 giftist Andrias við Vilgerð Astridardóttir úr Klaksvík. Tey høvdu verið gift í 9 ár, tá Vilgerð í fjør doyði av krabbameini. Andrias eigur tíggju abbabørn.

# Tvær megnar kvinnur leggja frá sær

**Fríggjadagin 29 okt. er seinasti arbeiðsdagur hjá Hervør Mohr og Jórun Ellefsen á Sernámsdeplinum. Tær hava nú í ein mansaldur arbeitt innan tað sernámsfrøðiliga virksemið**

Báðar hava tær útbúgving sum barnagarðslærarar frá Nordisk Montessori Kursus for børnehavelærere í Keypmannahavn í 1962, og í 1985 tóku tær útbúgv-ing sum serlærarar.

Í 1966 byrjaði Hervør á Færøernes Specialskole, sum tá helt til á V.B.V. sum seinri fekk heitið Skúlin á Trøðni. Jórun byrjaði á Skúlanum í 1976.

*Fríggjadagin 29 oktober er seinasti arbeiðsdagur hjá Jórun Ellefsen og Hervør Mohr á Sernámsdeplinum*



Tær hava hesi mongu ár havt nógvar ymiskar arbeiðsuppgávur, sum tær hava gingið uppí við lív og sál. Hjálpsamar og fyrikomandi hava tær lætt manga byrðu, og hjálpt og stuðlað teimum, ið eru komin higar.

Vit eru nógv, sum hava havt gleði av teirra dugnaskapi og vitan, sum vit hervið takka teimum hjartaliga fyri.

*Kollegar og systkinabørn, ólíkar tó,*
*men málið var sernámið, sum tykkum dró,*
*úr skúlanum melda út báðar í senn*
*við eftirløn sum danskir tænastumenn.*
*Nú tit rigga av, barnagarðurin skal*
*við starvsfólkum ynskja, at alt gongur væl,*
*nú tit skulu fáast við heilt onnur ting,*
*og dagliga toppstykkið halda í sving.*
*Vit vóna, tit báðar tó vitja við hvørt*
*í skúlanum, hóast tit upp hava gjørt,*
--o--
*Eitt prát er so hugaligt, gloymið ei tað*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri alla hjálp og sýnda samkenslu,
tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Rakul S. Joensen**
**fødd Mikkelsen**
**Gásadalur**

doyði og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk til øll í fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Ein serstøk tøkk til øll tykkum í Gásadali,
sum tóku ímóti fólki aftan á jarðarferðina.

*Fyri tey avvarandi*

**Børnini**

## Dagurin

**29. oktober. Narcissus**, deyður ár 222. Hann hevur helst verið av grikskari ætt og gjørdist 30. biskupur í Jerusalem. Hann segðist at vera 116 ár, tá ið hann doyði.

*Yrkingin sum Jóannes Skalle las upp undir hátáðarhaldinum hjá Frelsunarherinum.*

## William Booth ovasti kemur til himmals

Booth gekk treystliga á odda, á trummu hann sló.
*(Ert tú tváðaur í Lambsins blóð?)*
Í himli tey smíltust og søgdu: "Har kemur hon,
menniskjan góð."
*(Ert tú tváaður í Lambsins blóð?)*

Spitølsk hann eltu í longum røðum,
og útskotspakk úr heimsins myrkastu støðum.
Krúpandi syndarar og bølmenni frek
Girndarhugað menniskju – til glatanar sek.
Maðketnar sálir við ringum anda.
Mikið fjølmenni av fólkum í vanda
Øll hesi hann leiddi for trúnuna at standa.

Hvørt eitt fátækrabýlið og hvørt eitt skýmaskot
sendi sín skara
Hóast Booth fegin vildi havt fleir við sær at fara
Tjóðarfløgg øll um allan heim
veittraðu við heiður og himmalskum gleim.
Gentur á ljóðføri spældu fagnaðargklang,
meðan tær sungu henda himmalska sang.

Halleluja! Tað var hugtakandi at sjá
harðrendar fangar, sum Kristur loysti
fongslunum frá.
Ótangar blástu trompetir í.
Upp, upp, upp gjøgnum gyltu ský!

Booth doyði blindur, tó var trúgvin so sterk,
at eygu hans greitt sóu Harrans mikla verk.
Óræddur Boot á odda gekk, høvdingi líkur,
Sjáldan í Himli sást mannavinur slíkur.
Skeggið í andarisi, yvirbragdið sum stál,
tá hann óviknaður steig innum – hann var komin
á mál.

Jesus kom út gjøgnum forgarðsdyr, hann brosti við.
Mildur hann signaði hetta vána lið.
Booth sá einki, men leiddi kortini liðið beina gøtu
inn á ta stóru forgarðsfløtu.
So! Við eitt! Liðið steðgaði á – og sí,
Fóru so aftur til gongu ílatin klæði ný.
Kropnað rættu seg upp, visnaðir limir
gjørdust sterkir,
og blind sóu ein nýggjan heim – Gud framdi verkið.

Ótrivavætti og illkvendi í veitslulag!
Trútin andlit gjørdust rein sum hagin kavadag.
Tey vóru nú vísmenn og kongar í kempulíki.
Sloppin úr heimsins runudíki.

Skarin varð skøddur, fekk eldsveingir stórar,
og fagnaðarsangur køvdi einglakórið.

O, rópa bjarging! Tað var gott at sjá
glatað menniskju, sum sluppu syndaleinkjum frá.
Spælt varð á ljóðføri, væl mundu tey duga,
tey nýtváað menniskju, ið spældu av fullum huga.

Og tá Boot steðgaði og til bøn fall á knæ,
sá hann sín Harra, og lundin varð glað.
Kristur kom blíður, gav honum klæði og krúnu,
og øll løgdust á knæ for Himinsins trúnu.
Hann sá Himnakongin, mannavinin, ið ber av øllum.
Og hann smíltist gjøgnum tár – hann var loksins
í Himnahøllum.

**N.V. Lindsay / Jóannes Skaale umsetti**

## 85 ára føðingardagar

Fríggjadagin 29. okt. verður Jensia Svabo Thomasen, Sandavágur 85 ár. Frá kl. 18 hendan dagin, verður hon at hitta í *Fútalág 42 Tórshavn.*

Fríggjadagin 29. oktober fyllir Lillan Jacobsen, Klaksvík, 85 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.